

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 05 - 2012

# Vælkomin til Føroya Jens Stoltenberg

Í dag kemur norski forsætisráðharrin Jens Stoltenberg til Føroya. Tað er løgmaður, ið hevur boðið honum henda vegin, nú hann er ávegisá NATO fund í USA. Stoltenberg fer í dag at vera í Norðurlandahúsinum til stórt mentanartiltak og í kvøld er løgmaður vertur til ein døgurða í Müllers pakkhúsi. Fríggjadagin vitjar norski forsætisráðharrin ma. í Kirkjubø. Eg fegnist stórliga um, at norski forsætismálaráðharrin Jens Stoltenberg - nú kemur at vitja í Føroyum, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, nú norski forsætisráðharrin Jens Stoltenberg vitjar í Føroyum. Føroyar hava samstarv bæði alment og vinnuligt - á týðandi økjum við granna okkara fyri eystan. Samstarvið snýr seg m.a. um flogferðslu, aling, supply - og standyvirksemi og innan gransking og við ymiskar myndugleikar á hesum økjum, sigur landsstýrmaðurin og heldur fram - Serliga havi eg hug at nevna samstarvið, sum er innan oljuleitingarvirksemið. Her snýr samstarvið fyrst og fremst um sjálvt leitingarvirksemið, men eisini innan goymslu av data og um, at vit kunnu fáa lut í royndunum, sum Noreg hevur innan oljuleiting og framleiðsu. Hetta hevur sera stóran týdning fyri eitt so lítið land sum Føroyar, og hava vit møtt sera stórum vælvilja frá norskari síðu á hesum øki so væl sum á øðrum økjum við. Johan Dahl vil í hesum sambandi geva norska oljufelagnum Statoil eitt herðaklapp fyri leiklut teirra í oljuleitingarvirkseminum við Føroyar, har felagið er lokomotivið, sum er. Eisini fyri teirra konstruktiva leiklut at draga føroyskar fyritøkur inn sum undirveitarar. Eg vil ynskja norska forsætismálaráðharranum vælkomnum, og eg ivist ikki í, at vitjanin fer at verða til gagns fyri báðar partar.